


# Vilt tú vera við til at menna vælferðina?

## Vit leita eftir 3 fulltrúum til Almanna- og heilsumálaráðið

Starvið sum fulltrúi á Fyrisitingardeildini er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum nærum altíð skulu loysast í tøttum samstarvi við hini 11 á deildini ella aðrar málsviðgerar í ráðnum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi eftirútbúgving.

Sum fulltrúi á Fyrisitingardeildini verða tínar uppgávur eitt nú at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir, at svara fyrispurningum frá løgtinginum og at tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Almanna- og heilsumálaráðnum.

Á Fyrisitingardeildini verður tú partur av einum liði av ágrýtnum starvsfeløgum, sum hava ymiska samfelagsvísindaliga útbúgving. Í løtuni er serliga tørvur á at víðka liðið við løgfrøðingum, men hevur tú aðra samfelagsliga kandidatútbúgving, so sum cand.merc.jur., cand.scient.adm. ella cand.scient.pol., vilja vit eisini fegin frætta frá tær.

Hjá okkum ber væl til at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at tað tekur fyrilit fyri serligum tørvi so sum børnum ella ítrivi.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Almanna- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til:

Almanna- og heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn

Og vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. mars 2007 kl. 12.00.

Tú ert vælkomin at venda tær til Eyðun Mohr Hansen, deildarstjóra, á telefon 304050 ella senda eitt teldubræv til ahr@ahr.fo. Eisini ber til at vitja heimasíðu okkara www.ahr.fo, har eitt nú bygnaðurin og uppgávurnar hjá Almanna- og heilsumálaráðnum eru lýstar. Almanna- og heilsumálaráðið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

# Starv í bókhaldinum



Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins og ein stóran part av almenna bókhaldinum.

Roknskaparhaldið á gjaldstovuni virkar sum eitt konsernroknskaparhald. Gjaldstovan tekur sær av t.d. inngjaldingum og útgjaldingum fyri stovnar.

Á gjaldstovuni arbeiða 32 fólk. Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle E-Business suite. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar:

- Felags lønarskipan
- Felags útgjaldingarskipan
- Búskettskipan
- Leiðslukunningarskipan
- Dátuvøruhús

Talið av brúkarum av loysnunum hjá Gjaldstovuni liggur okkurt um 1000.

Í løtuni verður arbeitt við at gera roknskaparhaldið á Gjaldstovuni 100% talgilt. Tað sum eyðkennir Gjaldstovuna eru broytingar, og at tað støðugt verður arbeitt við at menna verandi og nýggjar loysnir.

Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan arbeiðir við førleikamenn-ing, hevur eina flekstíðarskipan, og í fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

www.gjaldstovan.fo

**Arbeiðsuppgávurnar fevna í høvuðsheitum um:**

- avstemmingar t.d. millum ymsar skipanir
- vanligt bókhaldsarbeiði, sum kontering, bóking, ljóslesing, gera ymsar koyringar og arkivering
- arbeiði við landsroknskapinum
- samskifti við stovnar og borgarar

Lagt kann verða afturat, at starvsinnihaldið kann verða broytt í mun til tær royndir og útbúgving, sum tú hevur. Eisini skal tú avloysa við at fyrisita útgjaldingar landsins.

**Krøv:** Tað er fyrimunur, um tú hevur útbúgving á roknskaparøkinum - antin á hægri handilsskúla, ella hevur tikið roknskaparfakini á merkonomstigi e.t. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir frá bókhaldi. Talan er um eitt stórt roknskaparhald, har fleiri skipanir virka saman fyri at skapa eina størri heild. Tí er tað týdningarmesta, at tú hevur yvirlit og hevur skjótt við at seta teg inn í ting. Tú skalt verða ein positivur persónur, sum hevur góð samstarvsevni, og sum ikki ert bangin fyri at taka ímóti nýggjum avbjóðingum og broytingum.

**Gjaldstovan kann bjóða:** Stovnurin kann bjóða eitt spennandi arbeiðsumhvørvi, har fakliga stigið er í støðugum framburði, og har tað verða brúkt framkomin EDV-amboð. Nevnt kann verða, at stórur partur av bókhaldinum á gjaldstovuni er talgilt.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðirnar eru 39 tímar um vikuna, og starvið er lønt smb. sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Treytað av útbúgving og royndum, so er starvið lønt í Bólki III, IV ella V.

**Umsóknir:** Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða sendar til Føroya Gjaldstovu, Traðagøta 39, Boks 2009, 165 Argir. **Umsóknarfreistin er 12. mars 2007**.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at tosa við Maluna Rasmussen tel 35 24 75 ella tel 35 24 00.

DIMMALÆTTING 341200

# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ




Sosialurin
Sosialurin i